# MANNING

Hervið verður søkt eftir
**manning**
til M/F Norrönu,
at byrja beinanvegin



Størvini, ið sett verða, umfata flestu deildir innan catering so sum:

Sleiparar, barrfólk, cafeteriafólk, tænarar, kioskgentur, koytugentur og informatiónsgentur.

**Fylgjandi krevst:**

- **Heilsuprógv** fyri sjófólk, ikki eldri enn 2 ár.

Meira fæst at vita við at ringja á tlf. 345900 ella 345924 og spyr eftir Andrias.

Skrivlig umsókn verður at senda til:

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370
FO-110 Tórshavn

---

Sansir søkir samskipara/ráðgeva

# Kanst tú fáa brikkarnar upp á pláss?



Ein kampanja skal leggjast til rættis, og ein miðlaætlan skal leggjast fyri sjónvarp, útvørp og bløð. Faroe Island Tourist Guide og Atlantic Review skulu hava greinar og lýsingar. Eitt tilboð skal heintast upp á ein faldara. Eitt útkast skal gerast, myndir skulu takast og finnast, og týska umsetingin skal fáast til vega. Tað eru nógvir brikkar, sum skulu upp á pláss, og sum skulu samskipast.

Umframt arbeiði sum samskipari, skalt tú eisini verða før/ur fyri at tosa við okkara viðskiftafólk um, hvussu teirra vøra best verður marknaðarførd. Tú dugir væl at skriva føroyskt, og tú dugir væl at samskifta á donskum og enskum. Tú hevur eina hægri útbúgving innan sølu og samskifti ella hevur arbeitt innan hetta øki.

Tú kemur at arbeiða á einum reklamuvirki, sum tekur sær av samskiftisuppgávum fyri fleiri kendar fyritøkur og stovnar, so sum: Atlantic Airways, Tryggingarfelagið Føroyar, Kaupthing Føroyar, Kall, Poul Hansen, PRG, Vestsalmon, Føroya Kolvetni, Als, Vágatunnilin og fleiri onnur. Hugskotið er okkara styrki. Vit gera kampanjur, ið fevna um: lýsingar til bløð, sjónvarp og útvarp, internet, faldarar og onnur tiltøk. Sansir hevur júst nú eisini styrkt um sín internetførleika.

Ljóðar hetta, sum eitt starv fyri teg, so send umsóknina saman við tilhoyrandi tilfari til okkara. Vilt tú hava meira at vita um starvið, so ring til Høgna ella Hansinu á telefon 355 355.

Vit fara at bjóða tær vælkomnan í okkara spildurnýggju hús við Tinghúsvegin, sum vit flyta inn í 3. september, tá vit eisini rokna við, at tú byrjar.

Seinasta freist at søkja starvið er 15. august.

Umsóknin skal sendast til: Sansir pf, Tinghúsvegur 47, Box 1099, FO-110 Tórshavn, Tel 355 355, Fax 355 350, www.sansir.fo, sansir@sansir.fo

SANSIR

---



Smyril Line søkir eftir
## DEILDARLEIÐARA
til Incoming-deildina

Fólk við royndum frá ferðavinnuni hava fyrimun.
Tann, ið settur verður, má hava góð leiðslu- og samstarvsevni.

Løn og setanarviðurskifti annars eftir nærri avtalu.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

***Umsókn við møguligum prógvum og upplýsingum um royndir annars skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. august 2001.***

***Meira fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara á tel 34 59 00.***

**SMYRIL LINE**
**Postboks 370 • 110 Tórshavn**

---

# Starv á Statoil-støðini í Sørvági

Søkt verður eftir tilkomnum fólki til Statoil-støðina. Arbeitt verður í vaktum.

Meira fæst at vita um arbeiðið við at tosa við Martin.

**Handilsvirkið Niclasen**
Tlf. 332001

---

Til handlarnar við Hoyvíksvegin og Gripsvegin verður søkt eftir fyrikomandi

# Ekspeditrisu

Arbeiðið fevnir um skiftandi vaktir uml. 30 tímar um vikuna.

Ring ella støkk inn á gólvið og spyr eftir Andreu.

BAKARÍIÐ
P/F HJÁ GUNLEIVI
Hoyvíksvegur 65
Tlf. 22 51 61 ella 31 21 61

---

# Mýrusýra

Mýrusýra er at fáa frá Kemilux.

KEMILUX
Mykinesgøta 1
Tlf. 310833

---

# Landsfundurin 2001

verður í Norðstreymoy 14. og 15. september.

**Føroya Javnaðarflokkur**

---

# Sethús í Sandvík til sølu

**Matr. Nr. 462K, Sandvík**

Grundøkið: 1204 $m^2$
Húsavídd: 48 $m^2$
Úthús: 5 $m^2$
Sethús í 2 hæddum.

# Grundstykki í Sumba til sølu

**Matr. Nr. 98B, Sumba**

Grundøkið: 585 $m^2$

**Matr. Nr. 181, Sumba (Víkarbyrgi)**

Grundøkið: 336 $m^2$
Við ábygdum úthúsi.

Nærri fæst at vita við at venda sær til Suðuroyar Sparikassa, telefon nr.: 373064.

**SUÐUROYAR SPARIKASSI**
Postboks 2 · FO-900 Vágur
Telefon: 373064 · Telefax: 373340

---

# Føroya Psoriasisfelag

Vit vilja hervið boða frá, at komandi viðgerðartúrur fyri psoriasis verður á Bláa Lónið í Íslandi 7. sept. og heim aftur 4 vikur seinni.

Tey, ið hava tørv á viðgerð, fara til egnan kommunulækna, læknin fyllir umsóknarblaðið út og sendir tað til húðlæknan.

Umsókn skal latast inn seinast 10. august 2001. Eru ivamál hesum viðvíkjandi, eru tit vælkomin at ringja 424179.

*Vinarliga*

**Føroya Psoriasisfelag**

---

VEGG SAGING
Hurðar, vindeygu, veggir, garðar o.a.

HOL SAGING
Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.

GÓLV FRESING

GÓLV SAGING
Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

GÓLV SLÍPING

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

Sosialurin · 311820

---

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

---

# Montørur og telebúðarfólk til Føroya Tele í Runavík

*"Vel sjálv/-ur ta broyting, tú ynskir í verðini."*
*Mahatma Ghandi*

Vegna vaksandi virksemi, flytir deildin hjá Føroya Tele í Søldarfirði til Runavíkar, tíðliga í heyst. Í hesum sambandi søkja vit eftir 2 fólkum til Føroya Tele í Runavík at byrja 1. september 2001 ella skjótast tilber.

**TELEBÚÐARFÓLK**
Telebúðin í Runavík er ein av sjey Telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar.

Til Telebúðina í Runavík er tørvur á einum handilsfólki, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til, fyri at viðskiftafólk okkara fáa eina fyrsta floks tænastu. Vit kunnu bjóða eitt avbjóðandi og spennandi starv í stórari menning. Eisini er møguleiki fyri at vera við í menningini av Telebúðunum sum heild.

Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur handilsútbúgving og stóran áhuga innan økið. Ætlanin er í framtíðini at hava handilslærlingar í Telebúðini í Runavík, sum umsøkjarin helst kemur at hava ein aktivan leiklut í.

**Førleikar hjá umsøkjarunum:**
- royndir at avgreiða viðskiftafólk
- royndir við fjarskiftisútgerð og/ella aðrari tøkni
- áhuga og førleika innan tøkni
- evni at arbeiða og avgreiða mál í einum, til tíðir, stressandi arbeiðsdegi
- førleika innan allan vanligan handilsskap, t.d. kassauppgerðir og vøruteljingar

Telebúðin í Runavík fer at hava opið allar vanligar handilstíðir, og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í Telebúðini.

**MONTØRUR**
Til Føroya Tele í Runavík er tørvur á einum montøri, sum hevur hug at geva viðskiftafólkum okkara eina fyrsta floks tænastu, og sum hevur hug at luttaka í tí stóru menningini, sum fer fram innan fjarskifti. Tann, ið settur verður, kemur í stóran mun at taka sær av nýgerð og viðlíkahaldi av telefoninnstallatiónum.

Fyrimunur er, um umsøkjarin hevur útbúgving sum elektronikmekanikari, elektrikari e.l. ella hevur hollar vitanir innan økið. 

**Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiðið við serligum atliti til**
- nýgerð og viðlíkahald av innstallatiónum
- vanliga telefonútgerð
- vekslarar
- innanhýsis kaðalskipanir
- uttanhýsis kaðalskipanir
- telefonterminalar
- internet, ISDN og snarnet
- ráðgeva viðskiftafólk um felagaútgerð og tænastur hjá Føroya Tele

**Til bæði størvini**
Starvsfólk hjá Føroya Tele skulu duga væl at avgreiða viðskiftafólk, verða opin og duga væl at samstarva. Somuleiðis vænta vit, at starvsfólkini duga enskt og hava góðan kunnleika til edv.

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið fyri økið hjá Føroya Tele.

Gjøllari upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Sofus Nielsen, leiðara á Føroya Tele í Søldarfirði á telefon 441000 ella mail sn@ft.fo.

Umsóknirnar skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 13. august 2001 og skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn



Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*